**Ársfrágreiðing hjá Sjúkrarøktaretiska ráðnum 2019.**

Árliga ráðstevnan fyri norðurlendsku Sjúkrarøktaretisku ráðini var hildin 23 og 24 sept. í Stockholm í stóru og vøkru hølunum hjá svenska sjúkrarøktarfelagnum. Luttakandi ráðini vóru úr Danmark, Noregi, Grønlandi, Føroyum og Svøríki, umleið 25-30 luttakarar í alt.

Á ráðstevnuni vóru fyrilestrar og viðgerð av evnum sum:

**Professiónsetikkur** - har mett varð, at stórir partar av arbeiðinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum gongur ímóti okkara etisku virðum

Hetta hendir m.a. tá tørvurin á fleiri hondum í starvsfólkahópinum viðførur at røktin verður uppgávuorienterað og umsorganarvirðini tí eru í vanda fyri at verða burtur.

Harafturat, tá tað ikki verða givin tíð og rúm til etiska refleksjón og kritiska umhugsan, er vandi fyri at virðini ikki verða tikin við.

**Rættvísi** – tá prioriteringar í heilsuverkinum við manglandi ressoursum viðførir, at øll ikki kunnu fáa ta viðgerð tey hava rætt til. Hetta kemur fyri á øllum niveaum innan heilsuverkið.

Horisontalt, hvussu skulu vit satsa í mun til ymiskar sjúkur?

Vertikalt, hvussu skulu vit býta ressoursirnar ímillum sjúklingar t.d. hvør skal fyrst til viðgerð? Og hvør hevur rætt til viðgerð?

Ráðstevnan endaði við at gera eina felags samtykt sum sæst á heimasíðuni hjá felagnum:

*"um ikki at lata tað etisku refleksiónina tagna"*

Ráðstevnan 2020 verður í Keypmannahavn tann 13 og 14 septembur. Hetta er 30 ára jubileum hjá Danska Sjúkrarøktaretiska Ráðnum og í hesum sambandi er ætlanin at gera serliga nógv burturúr, har fyrsti dagurin er settur av til veitslu fyri innbodnum og næsti dagur er ráðstevna fyri norðurlendsku etisku ráðunum.

Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur avgjørt at verða virkið á Facebook fyri at koma tættari at limunum og gera tað lættari hjá bæði ráðnum og limunum at birta upp undir refleksjón og viðgerð av etiskum spurningum og tvístøðum. Í hesum sambandi hevur ráðið uppsett ávísar reglur fyri virksemi, soleiðis at m.a. tagnarskyldan ikki verður brotin. Bólkurin hevur fingið góða undirtøku eins og refleksjónsmodellið, sum er lagt út á stevnuna, hevur skapað áhuga bæði millum sjúkrarøktarfrøðingar og leiðarar.

Tað verður framhaldandi arbeitt við at reflektera yvir etiskar tvístøður eftir refleksiónsfrymlinum sum liggur á Facebooksíðuni hjá ráðnum. Noreg, Svøríki og Danmark fáa rættiliga nógvar etiskar tvístøður sendandi frá limunum til viðgerð. Tíverri ger hetta seg ikki galdandi í Føroyum hóast áheitanir um at senda hesar til ráðið og trygd er fyri ónavngevan.

Sjúkrarøktaretiska ráðið arbeiðir framhaldandi við at endurskoða etisku leiðreglurnar og hava umhugsa at fáa samstarv við danska sjúkrarøktaretiska ráðið í samband við hetta arbeiði.

Eisini verður arbeitt við evnum sum t.d. gengransking, fosturtøku og eutanasi sum eru viðkomandi fyri okkum sum fakbólk.

Næsti fundur hevur verið millum Etiska Ráðið, Siðfrøðinevndina hjá Sálarfrøðingum og Sjúkrarøktaretiska Ráðið um møguligar samstarvsmøguleikar. Tosað var um møgulig felags tiltøk í samband við økir, sum eru viðkomandi fyri fakøkini og samfelagið. Hetta verður viðgjørt nærri á komandi fundi.

Birna M. Joensen er farin úr ráðnum og vilja vit nýta høvi at takka henni fyri eitt avbera gott samstarv hesi árini. Nýggjur limur í ráðnum er Jana Mortensen, vald á aðalfundinum 2019, vit ynskja henni vælkomna í ráðið. Komandi aðalfund stendur ongin limur fyri vali.

Katrin Andersen Forkvinna.